# Nógv ferðsluóhapp



Ein Bygdaleiðir bussur, sum var á veg til Gomlu Rætt úr Havn fór mikudagin útav vegnum á Velbastað

**ÓHAPP**
*Ingrid Bjarnastein*

Kanska kom tað heldur óvæntað hjá nógvum bilførarum, tá kavin mikudagin legðist kring landið.

Lítið og onki av kava var um morgunin, og vóru tí nógvir bilar farnir til arbeiðis við summardekkum.

Í Havn vórðu 11 bilóhapp meldaði til politistøðina, og vóru tey øll í býnum í Havn. Helst hava verið fleiri onnur lítil óhapp, ið ikki eru vorðin meldað. Ongin av teimum 11 bilóhappunum innibar fólkaskaða.

Seint seinnapartin fór ein Bygdaleiðir bussur, sum var á veg úr Havn til Gomlu Rætt útav vegnum á Velbastað. Hann hevði sett nøkur fólk av, gleið hann tværtum vegin, soleiðis at hann steðgaði allari ferðsluni. Síðani gleið hann eitt lítið petti omanav vegnum.

10 fólk vóru við bussinum, men ongin av teimum fekk nakran skaða.

Bussurin varð gravaður leysur aftur, og tá hann var fingin upp á rættkjøl koyrdi hann víðari til Gomlu Rætt, sum var onki hent.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og regn av og á, seinnapartin eisini mjørki. Hitin kemur upp í 7 til 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Skrið ella stormur av vestri og ælingur, móti kvøldið sum vátaslettingur. Hitin fellur niður í 2 til 5 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Skrið ella stormur av útnyrðingi, um kvøldið minkar hann vindin. Ælingur, partvís kavi og hitalagið millum ÷1 og +2 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, týsdagin gul til andøvsgul av vestri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 7 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷2 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | ÷1 |
| Ammassalik | ÷6 |
| Saint John's | 13 |
| Halifax | 5 |
| Reykjavík | ÷1 |
| Seyðisfjørður | ÷1 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 13 |
| Tromsø | ÷3 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 9 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 17 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 19 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 13 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | – |
| New York | 17 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst – ein leivd av tropisku ódnini »MICHELLE« - 968 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer móti Grønlandsfjørðinum og gevur nógvan vind á okkara leiðum um vikuskiftí.




Lágtrýstini yvir Grønlandsfjørðinum fara í landnyrðing og hátrýstið við Írland stendur mestsum í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 07/11 kl. 06[00]– 08/11 kl. 06[00]. Hitin í gjár: ÷0,7°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 8,0 mm – mált frá 07/11 kl. 06[00]– 08/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 45,1 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

8. nov.: Seinna kvarter
11. nov.: Mánin næstur jørðini
15. nov.: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. nov | 01.06 | 13.45 | 00.06 | 12.45 | 00.21 | 13.00 | 03.06 | 15.45 | 04.06 | 16.45 | — | 12.00 | 11.00 | 23.24 | 01.21 | 14.00 | 02.21 | 15.00 | 00.51 | 13.30 | 02.06 | 14.45 |
| 10. nov | 02.09 | 14.33 | 01.09 | 13.33 | 01.24 | 13.48 | 04.09 | 16.33 | 05.09 | 17.33 | 00.24 | 12.48 | 11.48 | — | 02.24 | 14.48 | 03.24 | 15.48 | 01.54 | 14.18 | 03.09 | 15.33 |
| 11. nov | 02.55 | 15.18 | 01.55 | 14.18 | 02.10 | 14.33 | 04.55 | 17.18 | 05.55 | 18.18 | 01.10 | 13.33 | 00.10 | 12.33 | 03.10 | 15.33 | 04.10 | 16.33 | 02.40 | 15.03 | 03.55 | 16.18 |
| 12. nov | 03.42 | 16.07 | 02.42 | 15.07 | 02.57 | 15.22 | 05.42 | 18.07 | 06.42 | 19.07 | 01.57 | 14.22 | 00.57 | 13.22 | 03.57 | 16.22 | 04.57 | 17.22 | 03.27 | 15.52 | 04.42 | 17.07 |

5 707265 100050 >